## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig. Um kvøldið veksur hann vindin til hvassan vind av suðri, men framvegis turt.




**Veðrið hósdagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og fyrrapartin regn. Seinnapartin upp í ein strúk av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og vestri og ælingur, partvís kavi og hitin millum frostmarkið og +4 stig.

# Fólk lurta eftir ávaringunum

**Politiið í Havn sigur, at fólk hava lurtað væl eftir ávaringunum um vánaligu koyrilíkindini. Bara nakrir hendinga førarar eru komnir í óføri í keðiliga veðrinum mánadagin**

KOYRILÍKINDI
*Ingrid Bjarnastein*



*Kavaruddingin hevur gingið væl nú kavin er lagstur um alt landið. Henda myndin er tikin á Vestmannavegnum mánadagin, tá kavin varð ruddaður vekk, so bilar kundu ferðast ótarnaðir*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

– Tað hevur verið á eini góðari leið, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn um vánaligu koyrilíkindini og veðrið mánadagin og kvøldið.

– Fólk hava lurta eftir ávaringunum, so tað hava ikki verið tey stóru tingini. Nakrir hendinga bilar hava staðið fastir, og onkrir eru grivnir leysir, har vit hava fingið fatur á eigaranum.

Kavi er, umsíðir vildi onkur kanska sagt, lagstur um alt landið og ferðslan hevur verið heldur trek seinasta tveir dagarnar.

Men politiið í Havn letur sum heild væl at, og sigur, at kavaruddingin hevur eisini gingið væl.

– Maskinur hava verið at sæð til langt út á kvøldið mánadagin, og tær fóru í gongd aftur týsdagin um 5–5.30 tíðina. Allir teir stóru vegirnir í Havn vóru ruddaðir klokkan átta tá fólkið skuldi til arbeiðis, sigur vakthavandi.

Politiið sigur annars, at ongir ferðslutøppar hava verið. Í øllum førum ikki nakrir, ið hava verið til ampa.

– Tað er minni av bilum úti og ferðslan gongur spakuliga, men hon gongur sum hon skal. Fleiri fólk eru eisini at síggja til gongu. Trupult kann tó gerast hjá teimum at ganga, tí allur kavin verður ruddaður upp á gongubreytina, men sum er nú, so eru teir farnir í holt við at rudda gongubreytirnar fyri kava eisini.

Upplýst verður av politinum, at longu mánakvøldið, tá veðrið versnaði, minkaði ferðslan nógv.

– Tað lættir ótrúliga nógv um, at fólk lurta eftir okkara ávaringum. Um vit skulu út at leita eftir fólki og bilum, so eru tað so ótrúliga nógv fólk hjá okkum, sum skulu í gongd, og tað er heldur ikki so lætt at arbeiða í kavaroki, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn at enda.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷13 |
| Nuuk | – |
| Qaqortoq | ÷9 |
| Ammassalik | ÷9 |
| Saint John’s | 5 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | ÷5 |
| Seyðisfjørður | ÷6 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 0 |
| Aberdeen | 1 |
| London | 6 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | – |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | ÷13 |
| Moskva | ÷18 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | ÷5 |
| Kiev | ÷12 |
| Bukarest | ÷2 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 7 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 12 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 17 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 7 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 994 hPa eystan fyri Ísland fer í landsynningi. Eitt annað lágtrýst, 986 hPa sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.




Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani hevur regn og lýggjari veður við sær á okkara leiðum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/02 kl. 06⁰⁰– 04/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: ÷1,6°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,3 mm – mált frá 03/02 kl. 06⁰⁰–04/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 10,8 mm





**Vika 5 – 2. februar**

1. Centrum:
**06 - 53 - 71 - 56 - 27 - 04 - 22 - 23 - 54 - 73 - 75 - 70 - 02 - 72 - 68 - 44**

1. Ramme:
**49 - 43 - 07 - 17 - 20 - 66 - 58 - 09 - 15 - 12 - 16 - 35 - 50 - 19 - 36 - 13 - 25 - 52**

Fuld plade:
**64 - 26 - 61 - 21 - 67 - 63 - 46 - 40 - 34 - 42**

Fri spil: **B__EN**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **227.175,- kr.** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **78.355,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **19.611,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **599,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **53,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum


## VESTFALLSKYRRINDI

1. febr.: Tendring
7. febr.: Mánin longst frá jørðini
9. febr.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. feb | 09.35 | 21.55 | 08.35 | 20.55 | 08.50 | 21.10 | 11.35 | 23.55 | 00.16 | 12.35 | 07.50 | 20.10 | 06.50 | 19.10 | 09.50 | 22.10 | 10.50 | 23.10 | 09.20 | 21.40 | 10.35 | 22.55 |
| 6. feb | 10.14 | 22.33 | 09.14 | 21.33 | 09.29 | 21.48 | — | 12.14 | 00.55 | 13.14 | 08.29 | 20.48 | 07.29 | 19.48 | 10.29 | 22.48 | 11.29 | 23.48 | 09.59 | 22.18 | 11.14 | 23.33 |
| 7. feb | 10.53 | 23.14 | 09.53 | 22.14 | 10.08 | 22.29 | 00.33 | 12.53 | 01.33 | 13.53 | 09.08 | 21.29 | 08.08 | 20.29 | 11.08 | 23.29 | — | 12.08 | 10.38 | 22.59 | 11.53 | — |
| 8. feb | 11.32 | 23.51 | 10.32 | 22.51 | 10.47 | 23.06 | 01.14 | 13.32 | 02.14 | 14.32 | 09.47 | 22.06 | 08.47 | 21.06 | 11.47 | — | 00.29 | 12.47 | 11.17 | 23.36 | 00.14 | 12.32 |

5 707265 100036 >